

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 09 - 2011

# Statoilstjórin um boring - Ikki antin ella

Vit hava borað fyrr í Føroyum, so vit eru spentir uppá hesa komandi boringina. Vit fyrireika boringina í løtuni, og tað sær gott út sum nú er. Vit hava fingið pallin uppá pláss eins og nógvar aðrar fyrireikingar skulu gerast. Hetta sigur Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil, nú tað bert er eitt hálvt ár eftir, til farið verður undir ta dýrastu íløguna nakrantíð í Føroyum Brugdan 2 brunnurin á landgrunninum. Satoilstjórin viðgongur, at her er talan um eina sera stóra verkætlan og ein týðandi brunn. Váðin er stórur við hesum brunninum, og tað merkir, at tað er sera óvist, um vit koma at raka við nakað ella ikki". Hetta er óivað ein av orsøkunum til, at heimsins størsta oljufelag, ExxonMobile gjørdist partur av verkætlanini fyrr í ár. Rúni M. Hansen váttar fyri oljan.fo, at hetta er bæði ein dýr og avbjóðandi verkætlan, og tí verður tað spennandi at síggja, hvat verður funnið. Men tey eru við gott mót leggur Statoilstjórin aftrat. Siga ikki farvæl -Finna tit einki - sigur Statoil so farvæl við Føroyar? Nei tað gera vit ikki, tí vit hava eisini ein annan brunn, sum vit skulu bora tætt upp at markinum. Men finna vit einki, so er tað sjálvandi ikki positivt fyri føroyska økið, men nú mugu síggja. Tað er ikki antin ella og tað er ikki ein spurningur um einki ella heilt nógv. Tað kann eisini vera nakað ímillum hesi bæði, sum stimbrar okkum at bora aðrastaðni í økinum. Ætlanin er at seta borin í undirgrundina í apríl 2012. Rúni M. Hansen, Statoilstjóri á Bryggjubakka. Mynd Jan Müller